# Kjak

**Jógvan Nybo**
*Kommunustýrislimur Viðareiði*



## Tunnlar norð um fjall

*Síggi, at Kári á Rógvi hevur lagt uppskot fram á tingborð um at avtaka lógina um tunnlar norð um fjall, men fyribils sæst, at rættarnevndin mælir frá at samtykkja hetta uppskot.*

So langt so gott, men eg haldi, at her má onkur misskiljing verða komin í, tí tað verður bert tosað og skrivað um tunnlar norð um fjall, meðan tann størsti ferðsluvandin, sum er vegastrekki Viðareiði – Hvannasund ikki verður nevnt við einum orði, nú so nógv stríð er um íløgur.

Tunnlarnir norð um fjall eru so sanniliga átroðkandi at fáa gjørdar, men eg meti tað sæð út frá einum trygdarsjónarmiði soleiðis, at tunnilin Viðareiði – Hvannasund má gerast áðrenn tunnlarnir norð um fjall, tí vit tosa um her trygdina hjá teimum, sum dagliga koyra hetta vegastrekki.

Mín inniliga áheitan á politisku skipanina er hon, játtið fyrst pening til tunnil Viðareiði – Hvannasund og haraftaná tunnlar norð um fjall, tí teir tunlarnir eru so sanniliga ótíðarhóskandi og eiga at fáa høga raðfesting.



**Hendrik Egholm**
*stjóri á Magn*

## Eingin ivi: gassolja væl bíligari í Føroyum

*Sum helst einasta vøra av týdningi í landinum er gassolja til sethús og virkir bíligari í Føroyum enn í Danmark, eisini tá reinsað verður fyri skattir og avgjøld*

Sosialurin skrivar hósdagin 29. apríl um eina sera áhugaverda kanning hjá Hera á Rógvi, búskaparfrøðingi, um prísmun millum Føroyar og Danmark.

**Neyðug kanning**

Slíkar kanningar koma væl við hjá okkum í Føroyum. Tær áttu at verið gjørdar javnan, so vit kunnu fylgja gongdini. Vónandi kunnu brúkarar, handlandi og politikarar gera sær nakrar hóskandi tankar út frá kanning sum hesari.

Kanningin staðfestir, at stórt sæð allar vørur í Føroyum eru væl dýrari í Føroyum enn í Danmark.

Tíbetur staðfestir Heri á Rógvi sambært Sosialinum eisini, at brennievni er væl bíligari í Føroyum enn í Danmark.

**Ógrundaður ivi í kanningini**

Kortini undrar tað, at Heri á Rógvi á síðu 16 í Sosialinum skoytir hetta uppí:

*»Í Føroyum eru avgjøldini nógv lægri enn í Danmark. Verða prísirnir ruddaðir fyri avgjøld, er tað ógvuliga ivasamt um prísurin á brennievni (gassolja til hús/virkir, diesel og bensin til bilar, HE) tá hevði verið bíligari í Føroyum enn í Danmark«.*

Henda iva skulu Heri á Rógvi og allir aðrir føroyingar ikki sleppa at sita leingi við.

**Gassolja er bíligari í Føroyum**

Eg havi áður víst á, at gassolja – hon fer til sethús og virkir – er væl bíligari í Føroyum enn í Danmark. *Tað er eisini myndin, tá skattir og avgjøld eru tikin frá.* Hetta skal eg fegin endurtaka.

Talvan niðan fyri vísir prísmunin á gassolju, diesel og bensin í Føroyum mótvegis Danmark í prosentum, hetta tá tølini eru reinsað fyri skattir og avgjøld.

| | 1. mai 2010 | Miðal 2009 |
|---|---|---|
| Bíligari gassolja | -10,30% | -8,30% |
| Dýrari diesel | 2,80% | 6,90% |
| Dýrari bensin | 8,60% | 12,80% |

Vit síggja, at hóast skattir og avgjøld eru reinsaði úr, liggur gassoljan væl undir danskar prísir. Diesel er eitt lítið vet dýrari, meðan bensinið er dýrari.

Um Heri á Rógvi ella onnur vilja vita meira, eru fólk vælkomin at skriva á hendrik@magn.fo ella ringja á 237410.

Vit 140 starvsfólk á Magn kunnu so einans vóna, at tølini verða brúkt. Vit eru sjálvandi errin av, at vit, sum ein av teimum heilt fáu fyritøkum í landinum, klára at selja okkara høvuðsvøru gassoljuna bíligari enn í Danmark – eisini tá reinsað verður fyri skattir og avgjøld. Serliga nú kanningin hjá Hera á Rógvi staðfestir, at samstundis sum vit klára hettar, so eru prísirnir á diesel og bensin ikki nær námind so langt yvir danskar prísir, sum fleiri av hinum vørunum, Heri á Rógvi viðger, vísa seg at vera.

**Kappingarráðið kannar**

At enda kann eg leggja afturat, at Kappingarráðið í løtuni kannar oljuprísirnar í Føroyum. Tíverri er kanningin nógv seinkað, helst vegna ov fáar ressourcir á Kappingarráðnum. Vit síggja fram til niðurstøðuna av kanningini.

Kanningin hjá Hera á Rógvi staðfestir í hvussu so er, at sammett við Danmark liggja oljuprísirnir í Føroyum í tí absolutt sobra endanum sammett við aðrar prísir her í landinum.

Týdningarmesta vøran, ið eisini er høvuðssøluvøran hjá Magn, liggur sum sagt undir donskum prísum! So er tað staðfest.



**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

## Jørgen Niclasen er nokkso stuttligur

**»Útreiðsluneutralt« – ikki galdandi fyri Uttanríkisráðið...**

»Útreiðsluneutralt!«

Tað sigur Jørgen Niclasen – tvs. at tá ein landsstýrismaður kemur í úrtíð við einum dýrum uppskoti, so skal hann sjálvur finna pengarnar við at spara aðrastaðni innan fyri sítt egna øki.

Okkara góði Jørgen leggur so eitt uppskot fyri tingið um granskingarsáttmála við ES. Hetta kostar landskassanum 30 mió kr. yvir 4 ár. Tær fyrstu 7 longu í ár.

Men Jørgen ætlar sær ikki at betala, tí hetta um »útreiðsluneutralitet«, tað er ikki galdandi fyri Uttanríkisráðið. Tað er bara galdandi fyri øll hini. Hann eigur hetta dýrabæra uppskotið – men ikki figgjarligu ábyrgdina. Tað er ókey, at »uttanríkisráðharrin« sleppur til borðs í Bruxelles. Men eftirsum Helena annars hevur við granskingina at gera, so má hon betala.

Tó tað gongur ikki. Hon kann ikki skera burtur úr fólkaskúlanum fyri at geva Jørgeni at flagga við!

So finnur Jørgen útav, at landskassin eigur ein ekstra kassa, sum partamaðurin og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum situr á. Fínt, heldur Jørgen, sparing og sparing, hvat er tað millum vinir – eg fái Jacob at betala hesar fyrstu 7 miljónirnar. Tann tíð, tann sorg við hinum 23 miljónunum.

Soleiðis blívir hetta »útreiðsluneutralt« á la Jørgen Niclasen.

Men mark skal vera fyri stuttleikanum, heldur Jørgen. Uppskotið hjá Helenu, um at vit mugu taka 300 næmingar eyka inn á miðnámsútbúgvingarnar – heldur enn at senda tey út í arbeiðsloysi í heyst ella ekspedera tey út av landinum – tað skal vera ordiliga »útreiðsluneutralt«!

Sjálvt um øll í landsstýrinum – við Kong Kaj á odda – svóru at gjalda fyri, at ungdómurin skuldi sleppa í skúla, so setir Jørgen nú knyklar í brýr, og krevur ordiligan »útreiðsluneutralitet« av Helenu: vil hon brúka pengar til eyka skúlapláss til tey ungu, so má hon betala tað sjálv. Tvs. inn í fólkaskúlan eftir pengunum!

Jørgen fær fría mikrofon at undirhalda við hesum í Kringvarpinum, fyrradagin í sjónvarpinum og í gjár í útvarpinum. Sum ein annar Jákup Veyhe, ja hann fær nógv betri tíð enn teir stuttligu minuttirnir hjá Jákupi fríggjamorgun!

Vit flenna eftir Jákupi. Men taka vit Jørgen í álvara? Er tað so lætt at fuppa fólk? Nei, ha?